Andras Mortensen, landsantikvarur
Føroya Fornminnissavn
Postboks 1155
110 Tórshavn

| **Okkara j. nr.** | **Málsviðg.** | **Dagfesting** | **Tygara j. nr.** |
|---|---|---|---|
| **2008-3157/9 SG** | **Hanna Simonsen** | **19/09/2008** | |

**Broyting av viðtøkum fyri Tórshavnar býarsavn**

Á fundi 11. september 2008 samtykti Tórshavnar Býráð at gera hesar broytingar í viðtøkunum fyri Tórshavnar býarsavn:

Grein 2 verður soljóðandi:

***Bygnaður og savnsnevnd***

*Tórshavnar býarsavn er skipað sum kommunalur stovnur undir mentamáladeildini, og savnvørðurin vísir fyrisitingarliga til leiðaran á mentamáladeildini.*

*Mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs er savnsnevnd hjá Tórshavnar býarsavni og hevur ábyrgd av rakstrinum. Savnið hevur sítt fakliga samstarv beinleiðis við landsantikvarin.*

Í staðin fyri:

**"Savnsnevnd**

Í savnsnevndini eru tríggir limir valdir av býráðnum. Valskeiðið er fýra ár og fylgir valskeiðinum hjá býráðnum. Nevndin verður sitandi, til nývalt býráð hevur valt aðra nevnd. Nevndin fyrisetur sjálva arbeiðsgongdina og býtir arbeiðið limanna millum. Hon hevur fund í minsta lagi tvær reisur um árið, apríl og september, og annars tá ið formaðurin ella ein meiriluti í nevndini krevur tað. Nevndin hevur ábyrgdina av savnsrakstrinum, og hvussuleiðis inntøkurnar verða brúktar. Hon skal tí taka upp samráðingar, sum neyðugar eru, við býráðið til tess at tryggja savninum neyðturviligan rakstrarstudning."



Vaglið · Postboks 32 Tel. +298 30 20 10 torshavn@torshavn.fo
FO-110 Tórshavn Fax +298 30 20 11 www.torshavn.fo

Grein 4 verður soljóðandi:

***Fyrisiting***

*Savnvørðurin hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum av savninum innan teir karmar, viðtøkurnar seta.*

Í staðin fyri:

**"Starvsfólk**

Savnsvørðurin stendur fyri umsitingarligu leiðsluni av savninum. Býráðið kann eftir tilmæli frá nevndini seta hjálparfólk. Savnsvørðurin virkar sum skrivari hjá nevndini og stílar fyri virkseminum við heimild frá nevndini."

Sambært grein 8 í viðtøkunum fyri Tórshavnar býarsavn kann býráðið gera broytingar í viðtøkunum, men skulu tær tá góðkennast av landsantikvarinum og landsstýrinum. Heitt verður hervið á landsantikvarin um at góðkenna omanfyri nevndu broytingar og síðani senda tær víðari til landsstýrið til góðkenningar.

Galdandi viðtøkur fyri Tórshavnar býarsavn eru hjálagdar.

Vinarliga

Heðin Mortensen
borgarstjóri

Jens Marius Poulsen
kommunustjóri



Vaglið · Postboks 32
FO-110 Tórshavn
Tel. +298 30 20 10
Fax +298 30 20 11
torshavn@torshavn.fo
www.torshavn.fo

# Viðtøkur
# fyri
# Tórshavnar býarsavn

**Grein 1**
**Endamál og rakstur**

Tórshavnar býarsavn er ogn Tórshavnar kommunu. Savnið hevur til endamáls:

a) at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum, sum lýst er í løgtingslóg um friðing av føstum fornminnum og bygningum.

b) at fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og søguligum lendum. Føroya Fornminnissavn skal góðkenna útgrevstrarætlanina og geva útgrevstrarloyvi.

c) at savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan føroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttir til søguligar hendingar.

d) at hava í hondum savnan at staðarnøvnum og munnliga goymdum søgnminnum og hava hetta tilfar greitt til vitskapliga gransking.

e) at savna saman mest møguligt tilfar av øllum, ið viðvíkur Tórshavn, so allir tættir av Havnar søgu kunnu verða skrivaðir, og um neyðugt at skipa fyri at hon verður skrivað.

f) Savnið kann útvega sær fígging til verkætlanir uttaneftir. Landskassin hevur tó ikki endurgjaldsskyldu fyri útreiðslur savnsins, ið verða fíggjaðar á henda hátt.

Tað skal virka soleiðis, at tað hevur uppiborið studning eftir galdandi lóg um bygdasøvn. Neyðugur peningur til tess verður játtaður av kommununi, (samanber § 4 í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn).

**Grein 2**
**Savnsnevnd**

Í savnsnevndini eru tríggir limir valdir av býráðnum. Valskeiðið er fýra ár og fylgir valskeiðinum hjá býráðnum. Nevndin verður sitandi, til nývalt býráð hevur valt aðra nevnd. Nevndin fyrisetur sjálva arbeiðsgongdina og býtir arbeiðið limanna millum. Hon hevur fund í minsta lagi tvær reisur um árið, apríl og september, og annars tá ið formaðurin ella ein meiriluti í nevndini krevur tað. Nevndin hevur ábyrgdina av savnsrakstrinum, og hvussuleiðis inntøkurnar verða brúktar. Hon skal tí taka upp samráðingar, sum neyðugar eru, við býráðið til tess at tryggja savninum neyðturviligan rakstrarstudning.

**Grein 3**
**Virkisumdømi**

Virkisumdømið hjá Býarsavninum er Tórshavn, Argir, Hoyvík, Hvítanes, Sund og Kaldbak við serligum atliti at Tórshavnar býi. Býráðið kann tó eftir uppskoti frá savnsnevndini og í samráð við landsantikvarin skipa fyri, at deildir undir býarsavninum verða stovnaðar á plássum, sum hoyra til kommununa.

**Grein 4**
**Starvsfólk**

Savnsvørðurin stendur fyri umsitingarligu leiðsluni av savninum. Býráðið kann eftir tilmæli frá nevndini seta hjálparfólk. Savnsvørðurin virkar sum skrivari hjá nevndini og stílar fyri virkseminum við heimild frá nevndini.

**Grein 5**
**Tryggingar**

Savnsognirnar skulu vera tryggjaðar.

**Grein 6**
**Roknskapurin**

Savnsroknskapurin skal vera hildin soleiðis, at tað altíð er lætt at síggja, hvussu fíggjarstandurin er. Roknskaparárið er frá 1. januar til 31. desember. Roknskapurin verður hildin av roknskapardeild býráðsins, grannskoðaður av grannskoðarunum hjá kommununi. Grannskoðaður roknskapur verður saman við frágreiðing frá farna árinum latin landsantikvarinum at góðkenna til ásettu tíð.

**Grein 7**
**Avtøka av savninum ella broyting í skipanini.**

Viðtekur býráðið at halda uppat við savnsarbeiðinum skal frágreiðing um hetta verða send landsantikvarinum. Heldur savnið heilt uppat, verður víst til bygdasavnslógina.

**Grein 8**
**Gildi viðtøkunnar**

Henda viðtøka fær gildi, tá ið hon er samtykt á býráðsfundi og góðkend av landsantikvarinum og landsstýrinum. Býráðið kann gera broytingar í viðtøkuni, men skulu tær tá góðkennast av landsantikvarinum og landsstýrinum.